**Hóast lagt var upp til, at Eivør skuldi vísast fram fyri dønum í konsertsalinum í Tivoli, so var eingin ivi um, at í konsertsalinum leygarkvøldið vóru næstan bara føroyingar.**


Tá hon veruliga skuldi rokka, legði Eivør kassagittarin og tók elektriska gittaran fram

# Eivør fylti Tivoli við

UMMÆLI
*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*
*Myndir: Símun Jóannesarson*

Lógvabrestirnir í nærum fulla konsertsalinum í Tivoli mundu ongan enda taka, eftir at Eivør saman við einum sera væl leikandi bólki, hevði undirhildið samlaðu fjøldina. Har var eingin ivi millum fólk, Eivør hevði spælt eina stak góða konsert.

Eivør spældi nýggj og gomul løg og onkran klassikarara, áðrenn hon endaði við eykalagnum "Om lidt bli'r der stille", men stilt varð tað ikki, tí lógvabrestirnir buldraðu á, og Eivør og bólkurin komu út aftur at bukka fyri fjøldini. Soleiðis skal tað gerast. Hetta, at bólkar spæla eykalag oman á eykalag, er ein keðiligur óvani, ið alt ov nógvir bólkar hava. Men Eivør vísti høgan klassa. Hon spældi síni løg og endaði við tí vanliga hæddarpunktinum "Nú brennur tú í mær", sum leygarkvøldið aftur var frálíkur. Tá allur konsertsalurin reisti seg og klappaði hana inn aftur, spældi hon kenda Gasolin lagið, og so var slutt. Fólk vóru enn svong eftir Eivør, og fóru úr salinum, við jaligu kensluni, "eg hevði væl tíma at hoyrt meira við Eivør".

## Á tremur við føroyingum

Stásiligi konsertsalurin í Tivoli hevur ongantíð hýst so nógvum føroyingum sum í gjárkvøldið, tí tann stóri meirilutin av áskoðarum var føroyingar. Har var onkur hendinga dani og nakrir íslendingar, men annars var talan um føroyingar. Hópin av útisetum vóru komnir saman, har vóru føroyingar úr øllum heraðshornum í Danmark og ikki minst, vóru stak nógvir føroyingar, ið vóru komnir úr Føroyum at uppliva hesa løtuna saman við Eivør.

## Magnus var frálíkur

Konsertin varð býtt í tveir partar, og vit sluppu at uppliva eina Eivør, sum var í essinum. Við sær hevði hon stóran bólk. Har var ein strúkikvartett, ein gittarleikari, ein, ið spældi slagverk, ein trummuleikari, ein bassleikari, tvær, ið sungu kór, og so var Magnus Johannesen á ljómborðum, flygli og harmoniku. Serliga Magnus Johannesen var frálíkur alla konsertina. Við sínum frálíka spæli lyfti hann alla ljóðmyndina. Hann skapti stemningar í løgunum, ið gjørdu tey so øgiliga nærverandi. Tað var ein sonn frægd at hoyra tvey av okkara fremstu tónlistarfólkum á palli saman.

Í onkrum lagi, hevði eitt sindur av elektroniskum tónleiki snýkt seg eitt sindur inn, og hetta klæddi tónleikinum væl. Tað kennist, sum um hetta at fáa eitt sindur av elektroniskum ljóði og bitum, er mest natúrliga stigið hjá Eivør at taka, og her er eingin ivi um, at Magnus Johannesen kann verða heilt rætti maðurin, at taka hetta stigið saman við.

## Eivør hevur ment seg

Eivør hevði sjálv eina frálíka framførslu. Hon sang sum altíð sera væl, men tyktist eisini ment á hesum økinum. Óneyðugu útferðirnar upp í hægstu tónalegurnar, hava verið dekan ov nógvar seinastu tíðina, men nú vóru tær sleptar. Jú gaman í Eivør skríggjar enn, men nú var tað, tá tað hóskaði til lagið. Her var lagið Brostnar Borgir besta dømið. Á G!Festivalinum var friðarligi parturin av lagnum nærum oyðilagdur av hennara vokalu útferðum, meðan seinni partur av lagnum var framúrskarandi. Í Tivoli var lagið eitt tað besta, úr enda í annan. Tað, at røddin bleiv brúkt á ein yndisligan hátt í fyrra parti av lagnum, gjørdi effektina av skríggjunum í seinnu helvt av lagnum so ómetaliga nógv størri.

## Trívist í rokkinum

Annars tyktist framtíðin hjá Eivør sera ljós, tí eisini nýggju løgini vóru sera góð, har var serliga lagið Jin og jang gott. Hetta lagið rokkaði veruliga, eins og løgini Nú brennur tú í mær og Brostnar borgir. Tað var serliga í rokkpettunum, at Eivør veruliga kom til sín rætt, og tað er í mínum huga eingin ivi um, at tað er sum rokksongkvinna, at Eivør er sterkast.

Í rokkløgunum sást tó høgi miðalaldurin hjá tónleikarunum aftur. Tá tað veruliga rokkaði leitaði danin Troels Skovgård á gittara yvir móti onkrum rættiliga Pink Floyd kendum. Einki ringt um Pink Floyd, og hetta riggaði eisini sera væl, men samstundis sat eg sum lurtari og hugsaði, hvat ein yngri tónleikari við feskari tónleikasmakki kundi givið løgunum, ella hvat hevði hent, um Magnus Johannesen hevði slept allari vanahugsan og hevði teknofisera løgini, sum hann so ómetaliga væl dugur. Men í núverandi orkestur samanseting tikin hetta ikki upplagt.

Eingin ivi er um, at Troels Skovgård var ein av bestu monnunum á konsertini, hansara innliga og dugnaliga gittarspæl fylti konsertsalin og var ein sonn frægd at hoyra. Troels hevur nú spælt við Eivør eina tíð og er ein veruligur topp tónleikari. Men eg fari at ivast í, um hann er rætti maðurin at satsa uppá á gittaranum í framtíðini.

## Hvat ætlar Eivør?

Í lagnum Only A Friend Of Mine sang allur salurin við. Hetta lag er passaliga hilla-di-hey til at vera fangandi, og vísir eitt sindur teirri leiðina, ið Eivør traðkaði á saman við Bill Bourne. Hetta eitt sindur bygdasliga kundi nærum einhvør sungið, tí tá vit tosa um hetta slagið av felagssangi, so er songrøddin ikki so týdningarmikil. Tað tykist næstan sum spell, at ein songkvinna í Eivørsa flokki fæst við tílíkt. Men samstundis er tað altíð festligt og herligt. Men tað er nærliggjandi at spyrja hvat Eivør ætlar sær, tí markið millum fjøllbroytni og stíl ørkymlan er smælt.

## Óruddilia pallmynd

Alt meðan tónlistarliga framførslan var kekkað, vælspæld, væl løgd til rætt-